# Undirvísingargongd
# Okkara loyniliga stað
# – norðurlendskar stuttsøgur




Hugskot til undirvísingargongd í føroyskum, 3.-6. flokk

Týtt: Asta Wolles

© Nám 2026

# Undan lesing

## Væntanir

- Hvat fær heitið á bókini tykkum at hugsa um?
- Er nakað við myndini á permuni, sum fær tykkum at undrast ella forvitnast um, hvat søgurnar eru um?

## Stuttsøgutekstslag

- Stutt og einføld søgugongd.
- Tíðargongdin í hendingunum er ofta stutt.
- Fáir persónar eru við í stuttsøguni.
- Persónarnir verða ikki lýstir til lítar, vit fáa bara eitt lítið innlit.
- Í stuttsøguni er ofta ein ósemja, ein avbjóðing ella ein trupulleiki, sum høvuðspersónurin skal loysa.
- Ein vend er ofta í hendingagongdini, sum broytir lívið, hugburðin ella atferðina hjá høvuðspersóninum.
- Søgugongdin kann byrja sera brádliga.
- Endin er týdningarmikil. Ofta endar stuttsøgan á ein slíkan hátt, at lesarin kann gerast bilsin ella kløkkur.
- Í stuttsøgum eru mong ”tóm pláss.” Tað eru støð í tekstinum, har lesarin sjálvur má fylla plássini út fyri at fáa eina meining ella fatan, millum annað við at leita í tekstinum eftir svari.

© Nám 2026

## Meðan lisið verður

Stuttsøgugreining - 3.-4. flokkur

Sjangrublóman er sett saman av øllum teimum punktunum, sum tit skulu arbeiða við. Lesið helst søguna meira enn eina ferð og kannið hana væl fyri at finna slóðir til tykkara svar. Finnið dømi í tekstinum, sum stuðla svarunum. Skrivið svarini í eitt ark fyri seg.




### Søgugongd

Søgugongdin í einari stuttsøgu er oftast um eina ávísa hending.

- Hvat er søgan um?
- Er eitt ávíst tema ella evni í søguni?

### Tvístøða

Ofta er ein tvístøða í stuttsøguni, sum høvuðspersónurin skal loysa ella megna, ella sum er ein avbjóðing hjá honum.

- Hvør er tvístøðan í søguni?
- Hvørji avbjóðing møtir høvuðspersónurin, ella hvat skal hann/hon loysa ella megna?

### Persónar

Í eini stuttsøgu er oftast bara ein høvuðspersónur og fáir týdningarmiklir persónar. Høvuðspersónurin mennist ofta, lærir nakað ella broytist, sum søgan líður.

- Hvør er høvuðspersónur í søguni?
- Mennist høvuðspersónurin, lærir hann/hon okkurt ella broytist hann/hon, sum søgan líður?

© Nám 2026

## Frásøgufólk

Ein stuttsøga hevur altíð eitt frásøgufólk, sum sigur frá, hvat hendir. Tað kann t.d. vera høvuðspersónurin sjálvur, eitt eg frásøgufólk, ella tað kann vera eitt frásøgufólk í 3. persóni, sum sigur frá handlingini við at brúka hann/hon.

- Hvør er frásøgufólk í søguni?

## Teir tríggir partarnir í stuttsøguni

1. Byrjan
    - Hvussu byrjar søgan?
    - Hvørjir eru týdningarmestu persónarnir í søguni?
    - Hvør er tvístøðan?
2. Menning
    - Er handlingin í gongd og hevur høvuðspersónurin eina avbjóðing?
3. Endi
    - Verður tvístøðan í søguni loyst?
    - Hvat hevur høvuðspersónurin lært?
    - Er høvuðspersónurin farin ígjøgnum eina menning?
    - Endar søgan brádliga ella opið? Ella er ein endi í søguni?

## Boðskapur

Ein stuttsøga hevur ofta ein boðskap, rithøvundurin hevur nakað upp á hjarta, sum hann fegin vil hava lesaran at hugsa um. Tað kunnu vera evni sum kærleiki, einsemi ella annað.

- Hvønn boðskap hevur hendan stuttsøgan?



© Nám 2026

# Stuttsøgugreining - 5.-6. flokkur

Sjangrublóman er sett saman av øllum teimum punktunum, sum tit skulu arbeiða við. Lesið helst søguna meira enn eina ferð og kannið hana væl fyri at finna slóðir til tykkara svar. Finnið dømi í tekstinum, sum stuðla svarunum. Skrivið svarini á eitt ark fyri seg.




## Um stuttsøguna

- Hvør er rithøvundurin?
- Hvussu eitur stuttsøgan?
- Nær er stuttsøgan skrivað?
- Er stuttsøgan partur av einum størri savni?

## Bygnaður

- Er nakað sermerkt við uppsetingini, myndunum ella grafikkinum í stuttsøguni?
- Hvussu er søgugongdin? Er hon t.d. stutt, í tíðarrøð, ella er hon í einum heilt øðrum sniði?
- Hvussu langa tíð fevnir søgugongdin um?

## Umhvørvi

- Hvar fer søgan fram?
- Hvussu verður staðið lýst, har søgan fer fram?
- Hvussu er huglagið, har sum søgan fer fram?

© Nám 2026

## Persónar

- Hvør er høvuðspersónur í stuttsøguni?
- Hvørjir hjápersónar eru?
- Lýs sambandið ímillum høvuðspersónin og hjálparpersónarnar.
- Hvør er tvístøðan, kreppan ella avbjóðingin hjá høvuðspersóninum?
- Hvat ger høvuðspersónurin við hetta? Verður tvístøðan loyst?

## Snildir

- Finn støð í tekstinum, har rithøvundurin brúkar "tóm pláss".
- Greið frá, hvønn týdning tað hevur á lesingina.
- Duga tit at finna nøkur sáðkorn í tekstinum? (Sáðkorn er ein ábending, sum er at finna í tekstinum, soleiðis at vit betur kunnu skilja tvístøðuna).
- Finn vegamót í hendingagongdini, har søgan fær eina vend.

## Tulking

- Hevur stuttsøgan eitt tema?
- Hevur heitið á stuttsøguni ein serligan týdning?
- Hvat ber til at tulka ella skilja út frá endanum á stuttsøguni?
- Hvat hugsa tit?

© Nám 2026

## Eftir lesing

### Grannamál

Einaferð vóru norðurlond tættari knýtt at hvørjum øðrum málsliga. Felags norrøna málið broyttist við tíðini, men enn í dag, minna málini um hvørt annað, summi tó meira enn onnur. Í hesari undirvísingargongdini fara tit at arbeiða við at samanbera føroyskt og danskt.

Tit skulu nú lesa eina stuttsøgu á donskum. Tit lesa hana í felag og skiftast um at lesa upp á donskum.

### Ferðsluljóðs

Nú skulu tit gera eina samanberandi greining av stuttsøguni *Jeg gider ikke i skole i dag* við at brúka ferðsluljósháttin. Við hesum háttinum ber til at kanna líkleikar og munir ímillum bæði danskt og føroyskt. Ferðsluljósini geva tykkum eitt gott yvirlit. Tá ið tit eru liðug, kanna tit eftir í flokkinum, hvat tit hava funnið av líkleikum og munum. Orðini í stuttsøguni skulu litast við grønum, gulum og reyðum.

GRØNT: Grønu orðini eru tey somu á báðum málum. Tey hava sama týdning og verða stavað eins. Her er bara fulla ferð fram!

GULT: Gulu orðini hava sama týdning, men stavast eitt sindur ymiskt. Guli liturin vísir, at tit nú skulu vera ansin og seta ferðina niður.

REYTT: Tey reyðu orðini finnast ikki á føroyskum. Nú skulu tit steðga á fyri at skilja orðið. Hyggið fyrst at samanhanginum fyri at skilja týdningin á orðinum. Um tað ikki hjálpir, kunnu tit hyggja í orðabók.



© Nám 2026

## Hvørjum felagsskapum ert tú partur av?

Við íblástri út átakinum hjá TV2 “Alt det vi deler” skulu tit nú arbeiða við evninum felagsskapir. Sum innleiðsla til gongdina skulu tit í felag hyggja eftir lýsingini “Alt det vi deler”

https://www.youtube.com/watch?v=B3_52CULpJg

### Bólkaarbeiði 1. umfar

Í bólkum við 2-4 í hvørjum skulu tit skriva niður so nógvar felagsskapir, sum tit kunnu hugsa um. Tit fáa 10 minuttir til uppgávuna. Tað skulu vera felagsskapir, sum tit sjálv eru í, t.d. “flokkurin", “lesihestar”, ella “fótbóltsfjepparar”. Finnið eisini felagsskapir, sum ikki eru so sjálvsagdir, men sum kanska eru eitt sindur stuttligir sum “vit, sum pilka nøs”, “ræðast eiturkoppar” ella álvarsamar felagsskapir sum t.d. “vit, sum hava mist”.

### Felags gjøgnumgongd

Tá ið allir bólkarnir eru lidnir, tosa tit saman í flokkinum, hvørjar felagsskapir tit hava funnið fram til. Tit kunnu t.d. skriva teir á talvuna. Hvør bólkur fær síðan 3-5 felagsskapir at gera plakatir til. Eingin felagsskapur má koma fyri meira enn eina ferð.

### Bólkaarbeiði 2. umfar

Nú skulu tit gera plakatir til tykkara felagsskapir (A3). Tað skal standa týðiliga, hvønn felagsskap talan er um, og so skal vera pláss at seta krossar í eitt uppmerkt stað. Tit kunnu væl brúka ella tekna myndir. Tá bólkarnir eru lidnir, verða plakatirnar vístar fram í flokkinum.

### Plakat við felags yvirskrift

Gerið eina yvirskriftsplakat, sum kann hanga oman fyri allar plakatirnar, har tað t.d. stendur: “Hvørjum felagsskapi ert tú við í? Set kross við teir felagsskapir, sum tú ert partur av”. Tað skal eisini vera ein kassi at telja saman ymisku krossarnar til seinast.

© Nám 2026

## Plakatirnar verða hongdar upp

Syrgið fyri at fáa loyvi til at heingja plakatirnar upp á einum góðum plássi í skúlanum, har øll ganga framvið og síggja tær. Plakatirnar skulu hanga í 1-2 vikur.

## Plakatirnar verða savnaðar saman og greinaðar

Tá ið 1-2 vikur eru gingnar, verða plakatirnar tiknar niður, og nú skulu tit gera tykkum eitt felags yvirlit. Finnið svar til hesar spurningar og tosið saman í flokkinum.

- Hvussu mong hava svarað?
- Hvørjir felagsskapir hava fingið flestar krossar?
- Er nakar felagsskapur, sum ongan kross hevur fingið?
- Var nakað, sum gjørdi tykkum ovfarin?
- Um tit skuldu gjørt kanningina umaftur, høvdu tit so valt aðrar felagsskapir?
- Um tit høvdu skula gjørt eina kanning bara til lærararnar, hvussu kundi hon sæð út?



© Nám 2026

## Skrivið eina felags stuttsøgu

Tit skulu royna tykkum við at skriva tykkara egnu stuttsøgu, sum verður givin út í flokkinum.  Tit brúka tað vitan, tit nú hava um stuttsøgusjangruna og fylgja leiðbeiningini niðanfyri. Temað skal vera felagsskapur. Allur bólkurin eigur at vera við í gongdini at skriva og útgeva eina stuttsøgu, tað vil siga alt frá hugskotum, skrivigongd, ritstjórnan, rættlestri, uppseting og myndum til prent.

### Innihald

Veljið fyrst tvístøðuna, sum søgan skal vera um. Høvuðspersónurin hjá tykkum vil ella skal okkurt. Tað kann eisini vera ein avbjóðing, sum ger tað torført hjá høvuðspersóninum. Tvístøðan kann antin vera ein:

- Innari tvístøða: trupulleikin kemur frá høvuðspersóninum sjálvum (innaneftir).
- Ytri tvístøða: Høvuðspersónurin verður raktur av einum trupulleika ella einari avbjóðing uttaneftir.

### Bygnaður

Hendingagongdin í stuttsøguni skal helst byrja so skjótt, sum til ber , t.v.s., at vit koma inn, har tingini henda (“in medias res”). Stuttsøgan er bygd upp av trimum pørtum.

1. Stuttsøgan byrjar. Her møta vit persónum, umhvørvi og tvístøðu.

2. Miðjan. Her fer høvuðspersónurin ígjøgnum tvístøðuna.

3. Stuttsøgan endar. Tvístøðan í stuttsøguni hevur á onkran hátt ávirkað, broytt ella ment høvuðspersónin. Antin er tvístøðan loyst ella ikki. Stuttsøgan kann enda brádliga ella opið.



© Nám 2026

## Málburður

Tað eru nógvar lýsingar av bæði persónum og umhvørvi, sum søgan fer fram í. Tit skulu gera av, um søgan skal skrivast í nútíð ella tátíð

## Sjónarhorn

Tit velja, um tit skriva sum eg-frásøgufólk ella sum 3. persónsfrásøgufólk.

## Boðskapur

Ein stuttsøga hevur ofta ein boðskap, hon skal helst hava okkurt upp á hjarta. Stuttsøgan kann geva okkum eina mynd av einum parti av einum mannalívi ella vísa onkrar støður, sum vit lættliga kunnu spegla okkum í. Hon hjálpir okkum sostatt at fáa innlit í okkurt í verðini.

## Uppseting

1. Finnið eitt hóskandi navn til stuttsøguna.
2. Brúkið gásareygu við beinleiðis talu.
3. Býtið tekstin í hóskandi reglubrot, tá ið okkurt skifti er. Tað kann t.d. vera stað, tíð, sjónarhorn ella í hendingagongdini. Gerið dupulta reglufrástøðu ímillum brotini.

## Kjekklisti til stuttsøguna

- Stutt og einføld hendingagongd.
- Tíðarbilið í søgugongdini er stutt.
- Fáir persónar eru við - bert stutt innlit í tey sum persónar.
- Tvístøða: høvuðspersónurin skal loysa eina avbjóðing ella ein trupulleika.
- Hendingagongdin fær ofta eina vend, sum broytir lívið, hugburðin ella atburðin hjá høvuðspersóninum.
- Byrjanin kann vera brádlig og brúka "in medias res".
- Endin kann vera brádligur og opin ella eyðsýndur.
- "Tóm pláss", har alt ikki verður greitt frá.



© Nám 2026